WÜRTH® MONTAGEPROFI

# Würth messa á Hjalla

Í døgunum 25., 26. og 27. oktober verður Würth messa á Hjalla 6 í Hoyvík (har verkstaðið hjá Strandferðsluni fyrr helt til).

Vit fara at sýna fram eitt stórt úrval av tí, sum vit selja innan okkara fýra høvuðsvinnur:

**AUTO ▪ METAL ▪ EL ▪ TRÆ**

***...og fara vit sjálvandi at hava nøkur sera góð messu-tilboð!***

**Messan er opin soleiðis:**

Hósdag 25. & Fríggjadag 26. frá kl. 10.00 til kl. 18.00

Leygardag 27. frá kl. 11.00 til kl. 16.00

| | |
|---|---|
| **Claus Christensen** | Tel 22 50 17 |
| **Bernhard Jacobsen** | Tel 22 23 26 |

WÜRTH® Würth Føroyar

# VERKFØRARI

## TIL PERSÓNBILAVERKSTAÐIN HJÁ VR-BILUM

VR-Bilar søkja eftir verkførara til persónbilaverkstaðin at byrja skjótast til ber.

**Tínir førleikar**

Best er, um tú hevur sveinabræv sum bilsmiður og hevur royndir á økinum. Tað er eisini umráðandi, at tú dugir væl at samskifta og ert fyrikomandi.

**Arbeiðsøkið**

Sum verkførari fert tú at arbeiða í einum toymi saman við einum leiðandi tekniskum mekanikara. Arbeiðsuppgávan fevnir um samskifti við viðskiftafólk og at leiða og skipa arbeiðið á persónbilaverkstaðnum. Í løtuni eru seks fólk knýtt at verkstaðnum.

**Løn**

Lønin verður ásett sambært avtalu.

Hevur starvið tín áhuga, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Marna Olsen, stjóra, á 215 099 ella á marni@vr-bilar.fo.

**VR-Bilar Sp/f**
Hoyvíksvegur 61
Tel. +298 322 110
Fartel. +298 215 099
marni@vr-bilar.fo

VR BILAR

RENAULT VOLVO CHEVROLET

REFROZ



## Starv á Hagstovuni

Til at hava um hendi fíggjarlig hagtøl um tað almenna – land og kommunur – sóknast vit eftir einum vællærdum og áhugaðum starvsfólki.
Fíggjarliga uppgerðin av tí almenna er partur av tjóðarroknskapinum, men er eisini grundarlag undir sjálvstøðugum hagtølum um leiklutin hjá tí almenna í samfelagnum.

Tú verður partur av einum stovni, sum hevur informasjón til høvuðsstarv, har tú fært høvi at hava alt verkið um hendi - heilt frá tanka til útgávu.

Fyrimunur er at vera útbúgvin í búskaparfrøði ella samfelagsfrøði. Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi fakfelag.

Umsóknir skulu vera Hagstovuni í hendi í seinasta lagi 1. novembur 2007. Hevur tú áhuga í starvinum og vilt vita meira, vend tær so til Hagstovuna á telefon 352800 og fá fatur á Hermanni Oskarssyni, stjóra, ella John Jacobsen, deildarleiðara.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO

# Kokkur

Við hesum verður søkt eftir kokki til Strandfaraskip Landsins at seta í fast starv skjótast møguligt

Viðkomandi skal byrja umborð á Teistanum, men kann til eina og hvørja tíð verða fluttur umborð á onnur skip hjá Strandfaraskipum Landsins.
Arbeiðs- og vaktarskipanin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein er settur umborð á.

**Starvið fevnir um**
Høvuðsuppgávan hjá kokkinum er at matgera til manningina, og at hava sølubúðina um hendi.

Kokkurin hevur ábyrgd av:
- At reinføri er eftir galdandi ásetingum
- Tryggja at trygdin umborð er í samsvari við altjóða krøv
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

**Førleikakrøv**
- Praktiskar royndir sum kokkur
- Trygdarskeið
- Heilsuprógv
- Góð samstarvsevni
- Góðan røkjuskap

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- Fakligar avbjóðingar
- Eitt starv sum tú sleppur at skipa og menna
- Gott samanhald

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist**
Freistin at søkja starvið er 30. oktobur 2007, kl 12:00

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jan Haldansen, deildarleiðara, á tlf. 34 30 00 lokal 3041, ella e-post: jah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Sjó-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.